Landsverk hevur leingi pástaðið, at tað skuldi nýtast ov nógv grót til byrging til Skúvoyar.

Teir søgdu eini 8-10 mill m3.

So eg interpoleraði byrgingina ávís støð, og fekk at tað einans skuldi nýtast uml. 6 mill. m3 av tunnilsgróti, umframt uml. 340.000 m3 av stórum dekkgróti.

Landsverk hevur nú sagt at grótnøgdirnar vera 6 mill. m3.


Forklaring
Her eru aldurnar 250 m. langar.
Skúvoyarfjørður í stormi,
men har er eingin streymur av týdningi
Skúvoyarfjørður
Skarvanes
Tað fara uml. 1½
Skansabrúgv í
Skúvoyarbyrgingina
Nýtt Aliøki
Nýtt Aliøki
Dýpið er bert
11 m. á miðuna.
Hóast tað er stormur av ÚS
við 25-30 m/s, eru ongar
stórar aldur við byrgingina
Sandur skal heintast og
pumpast inn ímóti
syðru síðuni, fyri at
minka um trýstið á
byrgingina.
Skúvoyar
Tað er harði streymurin
sum ger uppgangin í
Skúgvi og á Skarvanesi.
N
800 m



Skúvoyarfjørður: Stormur av útsynningi. 25-30 m/s




Skúvoyar bygd.

Tunnilin er opin út ímóti sjónum, deils vegna at tað er “Ramsarøki” og so at tað aftur kann gerast lundaland, og deils at tunnlarnir kunnu vera atskildir vegna eld- og roykvanda.



Skúvoy

Byrgingin ger, at tað verður minni brim, tí uppgangur er ringast tá tað rekur ímóti ættini.




Suðurøkið

og

linjuføring til Suðuroy

Við tveimum tunnlum verður **byggitíðin bert ein triðing,** Byggivágin gert minni, og kostnaðurin NÓGV minni – og fleiri kunnu bjóða.

Íroknað verkætlanini eigur at vera 2-3 vindmyllur, sum nøkta orkunýtsluna til ljós, luft og vatn.



Havdýpið

til samanberingar við aðrar tunnlar


Skúvoy
Á hellunum í Skúvoy kunnu gerast Coanda
ventilatión og rýmingarleiðir.


Sunnast í Skúgvi
Á hellunum í Skúvoy kunnu gerast Coanda-ventilatión og rýmingarleiðir.
1:40 / 2:45



Video
Á hellunum í Skúvoy kunnu gerast
Coandaventilatión og rýmingarleiðir

Stóra Dímun er løgusteinur til Suðuroynna



35 m. breiða og 700 m. langa hellan á eystursíðuni ger tað gjørligt at koma upp og niður á Stóra Dímun við einum halli minni enn 4 %



Ein slættur og javnt hellandi sandbotnur ger at eingin uppgangur er.
Til Skúvoy 8 Km
Til Sandvík 11 Km
Til húsini á Stóru Dímun 2 Km
Stóru Dímun fyri eystan



Stóra Dímun

Hellan har tunnilin úr Skúgvi og Sandvík møtast.

Betongmúrur skal stoypast ímóti sjónum.



Stóra Dímun

Hallið kann gerast minni, um tunnilsbogin gerst størri.

Fyri vestan verður parkering inni í tunnlinum til bilar, og tunnilsskakt við skinnarum og trappur upp á oynni.

Á hellunum vera coanda-ventilatión og rýmingarleiðir.

Video

Eystanvert Stóru Dímun




Stóra Dímun
Lítla Dímun
Trappa og
skinnaravognur niðana
luft
Tunnil
Parkering
Rýmingarleið
Coandaventilatión
og rýmingarleið á
Stóru Dímun



Sandvík: **ein 700 m. langur tunnil verður undir bygdini.**



Av molanum og út á Sandvíksfles er einans 1.800 m.

Tí má portalurin liggja ájavnt sjóvarmálanum, tí portalurin má eisini liggja eini 500 m. frá bygdini.

Vegurin verður vardur av einum betongmúri ovast á klettunum.


Tí verður tað her at tað størsta hallið verður, men tó ikki yvir 4 %



Hvalba

Her er til- og frákoyring til landsvegin teknað við rundkoyring, og tí má koyrast við minni ferð.


Til Sandvík
Kote 0,20 m.
Portal.
6,00 m.
Kote 0,20 m.
Skálavegur
Sandavegur
Hvalba
Principtekning fyri motortrafikveg við frákoyringar- og tilkoyringarbanum.
Skálavegur liggur í kotu +4 m. og kann hækkast 1,5 – 2 m.
©Umhvørvisstovan | ©Pleiades Neo - Airbus



Stóra Dímun – Trongisvágur


Tunnilslongd: **16 km.**

Avstand millum rýmingarleiðir: **11 km.**

Coandaventilatión og rýmingarleið á Stóru Dímun: **Nøvan.**

Coandaventilatión og rýmingarleið á Suðuroy: **Urðin undir Nevinum**

(Lýkur IKKI krøvini í N500)



Stóra Dímun – Lítla Dímun - Trongisvágur

Tunnilslongd: **18 km.**

Coandaventilatión og rýmingarleið á Stóra Dímun: **Nøvan.**

Frástøður millum rýmingarleiðir:

Millum Stóru Dímun og Lítla Dímun: **6.5 km.**


Millum Lítla Dímun og Trongisvágur: **8 km.**

Coandaventilatión og rýmingarleið á Litla Dímun: **Garðstangi / Tangin á Gjógv.**

Coandaventilatión og rýmingarleið í Suðuroy: **Tangin á Bergið.**

(Lýkur krøvini í N500)

Via Sandvík 23 km. Via L. D. 18 km.





Vágar floghavn

Gamli terminalurin er í góðum standi, og verður ein glasveggur settur upp í cafeteria-økinum á “groundside”, har tú letur viðførið á band, verður samband við núverandi “Airside” terminalin.

Við hesum er “Airside” meira enn tvífaldað.

Vinnandi projektið hevur nógv lýti, sum roynt verður at fjala, við at flyta fokus.

Víst var á hvussu rúmligt tað var, tá man kom innar, men bygningarnir frá 2013 kunnu á ongan hátt rúma eina eyka hædd undir sama taki, har “flybrýr” kunnu setast upp.

Myndin vísur at “flybúgvin” er uppi millum sperrurnar, og tá hall er á takinum “skeiva vegin”, er hetta als ikki gjørligt.

Hetta er nevndin sjálvsagt væl vitandi um, og at bygningurin ikki kann víðkast, men má takast niður.

(Tí legði forkvinnan dent á, at verkætlanin ikki fór at órógva ferðsluna).



Sandoy, og komandi **Sandoy Airport**





Innflúgving til internationala **Pit stop** og **Hub** floghavnin

Sandoy Airport

Floghavnin kann taka størri flogfør enn Kastrup lufthavn.

Liggur geografiskt sera væl fyri sum **“Pit stop”** airport fyri **”refuelling”** av fragtflogførum, og sum internationalan **“Hub”.**


Kote 85m.
C.L.


Vágar floghavn lagt inn
Skálavík
Húsavík
41
42
350
250
300
200
150
100
40




Her er lagt inn


Billund lufthavn

2.800 m.

+ 2 x 900 m.

ljósrekkjur í endunum.



Cat. 3 C ILS
Auto-land
Sandoy Airport
15 gradir
ICAO Annex 14
Autolanding ILS CAT III a/b/c
"B"
"A"
+300m.
+300m.
Longd: 3.000m.
Flogbreytabreidd: 45 m.
kt: +45m.
kt: +60m.
0.4km



Svínoyarfjørður

Har nýtast ongir lastbilar, men einans heilt stórar maskinur, tí grótið skal flytast so stutt.

Tey nýggju aliøkini vilja økja munandi um útflutningin, so íløgan verður eitt íkast til landsbúðskapin eftir fáum árum.



Fugloyarfjørður

Har nýtast ongir lastbilar, men einans heilt stórar maskinur, tí grótið skal flytast so stutt.

Ein byrging vil gera tað heilt óneyðugt við skipum og tyrlum til Norðoyggjar, og sostatt spara landinum fyri 25-30 mill. um árið.

Hetta var tað – fyri fyrst og í stuttum.

- og so er at spyrja.....

Til Løgmansskrivstovuna.

Hoyringsskriv

- uttan og áðrenn, landsins stóvnar á økinum hava tikið lut í ætlaðu samferðsluumskipanina.

Eg mótmali, at Landsstýrið hevur hildið ætlanirnar loyniligar, og at stóvnar og borgarir einans fingu 14 dagars hoyringsfreist, sum bleiv longd eina viku.

Hetta í einari verkætlan sum - sambart Tunnilsfelagnum - tekur 10 ár at fremja.

Á fundunum legði Tunnilsfelagið fram nøkur elligomul uppskot um vegaføringar hjá Landsverk, har tey sjálvsagt ikki høvdu tikið hædd fyri einum komandi Suðuroyartunnli, og áhoyrarin hevði tískil ikki møguleika at taka støðu til eina ætlan um vegaføring, tí har var eingin ætlan.

Eg kann ikki annað enn øtast um mannagongdina hjá Tunnilsfelagnum, men eisini hjá Løgmanni, sum varar av.

Eg havi sjálvur síðani uml. 2014 arbeitt við einum samskipaðari ætlan um hvussu ein "motortrafikkvegur" kundi gerast til syðru oyggjarnar, og í tí ætlanini havi eg úttonkt eina vegaføring í Sandur - í Trøðum økinum, sum er til minstan ampa fyri umhvørvið, og til frama fyri einari skjótari og tryggari ferðslu á Landsvegnum.

Latið meg at enda gera vart við, at eg frámali einum tunnli úr Djúpadali, sum eg einans kann skýra sum ørðskapur, tá har eru aðrar og betri loysnir, og eg vil viðmala ein byrging frá Skarvanes til Skúvoyar.

Við tí í huga, vil eg leggja fram fylgjandi:

Snarlandsvegurin millum Líðarenda og Traðardal.

Á hoyringsfundunum hoyrdist, at nú var tað upp til Landsverk at binda báðar tunnilsmunnarnar saman.

Tunnilsfelagið hevði - enn einaferð - fastlagt hvar eitt hol skuldi vera, og so var var tað upp til "hini" at loysa sambindingina, og vísti til nakrar elligamlar tekningar hjá Landsverk, har Landsverk hevði lagt landsvegin gjøgnum landbúnaðarjørð og tætt upp at friðaðu Mølheyggjunum, ella fram við Sandsvatni, tí at fara niðan á hamarin, sum liggur í 200 meturs hædd var ov ógvusligt, segði Landsverk.

Ein "undaligur" pástandur, tá tað var Landsverk sjálvt sum upprunaliga noyddu sandingar uppum Velbastaðháls, sum liggur hægri, tí tá hevði tað verið best, um farið var av Argjum við einum tunnli til Hest, og síðani til Skopun, í hægst 50 metrar hædd.

Sjá FB-vangan hjá mær.

Men Landsverk vildu ikki hava Hestoynna við inn í nútíðina.

Her er ein "loysn" sum ger, at Sandur/í Trøðum er púra fríur fyri landsvegaferðslu, og sum eisini tekur hædd fyri óljóði og ljósglæmu frá ferðsluni.

Tað ber (nokk so væl) til, at leggja ein nýggjan landsveg frá landsvegnum við Fossin í Sandalíð, sum liggur í 44 m. hædd, og so á skák niðan til eina hædd uppá uml. 50 m., og so framvið bøgarðarnar í umleið somu hædd, líka fram til tunnilsmunnan í Traðadali - sjá mynd.

Um so ein volla av mold og tunnilsgróti bleiv gjørd framvið landsvegnum, so hevði ferðslan nærum ongin neilig ávirkan havt á umhvørvið.

Við Fossin í Sandalíð er so mikið rúmsátt, at ein T-samanbinding kann gerast til Sands og í Trøðum.

Vinaliga

Jóannes í Dali



Til Løgmansskrivstovuna.

Hoyringsskriv nr. 2

- til hoyringsfundirnar um Suðuroyartunnilin.

Eg taki frástøðu frá tí mannagong sum Landsstýrið (og Løgtingið) hava stungið út í kortið, at lata upp í hendurnar á einum partafelag, at skipa fyri á hvønn hátt samferðslukervið skal mennast í Føroyum.

Hettar er avleiðingin av at Landsstýrið nú biður Løgtingið um at lóggeva hvar tvey hol skulu borast á ávikavist Sandoynni og í Suðuroynni.

- uttan og áðrenn, landsins stóvnar á økinum hava tikið lut í ætlaðu samferðsluumskipanini.

Eg mótmali, at Landsstýrið hevur hildið ætlanirnar loyniligar, og at stóvnar og borgarir einans fingu 14 dagars hoyringsfreist, sum bleiv longd eina viku.

Hetta í einari verkætlan sum - sambart Tunnilsfelagnum - tekur 10 ár at fremja.

Á fundunum legði Tunnilsfelagið fram nøkur elligomul uppskot um vegaføringar hjá Landsverk, har tey sjálvsagt ikki høvdu tikið hædd fyri einum komandi Suðuroyartunnli, og áhoyrarin hevði tískil ikki møguleika at taka støðu til eina ætlan um vegaføring, tí har var eingin ætlan.

Eg kann ikki annað enn øtast um mannagongdina hjá Tunnilsfelagnum, men eisini hjá Løgmanni, sum varar av.

Landsverk hevur síðani aldarskiftið - saman við samferðslumálráðnum - lagt fram ætlanir um hvussu samferðsluviðuskiftini kundi betrast í Sandalíð og á Líðarenda, og hevur í uppskoti ymsar - ovurdýrar - tunnilsloysnir.

Nú kemur so Tunnilsfelagið og leggur fram forprojekt gjørt av LBF, sum bindur tunnilsmunnan í Djúpadali í Skálavíkarvegin omaná har gamli Skarvanesvegurin er.

Men LBF staðfestur m.a.:

"Frávik frá H1 standardi

Í einum strekkið á 450 við entreprisumartk á Líðarenda er longdarhallið 6,5 %. Hetta er

størri enn markviðrið á 6% fyri H1 vegir.

Sama er galdandi fyri eitt stutt við st 37.000 har longdarhallið eisini er 6,5 %".

Tá eitt stórst verkfrøðingarfelag má staðfesta, at normarnir vera brotnir, so er at fara at kanna, um tað finnast aðrar loysnir, men tað verðu ikki gjørt.

Tað meinar Tunnilsfelagið eyðsýnt er upp til politikarar at góðtaka, at mormarnar **VERA** brotnar.

Men soleiðis eigur tað ikki at vera.

Ein verkætlan skal vera so lítaleys sum gjørligt.

Í míni heildarverkætlan fyri ein komandi suðurfarleið, sum eg m.a. sendi til Landsverk og Ferðslumálaráðið í uml. 2014, og eisini seinni, har ein byrging skuldi gerast av Skarvanesi til Skúvoy, var tað eyðsýnt at høvuðsfarleiðin ikki fyrst kundi ganga niðan í 122 m. hædd, fyri síðani aftur - og sera bratt: 6,5 % - oman aftur í somu hædd.

Ein slík høvuðsfarleið gevur onga meining - í mínum hugaheimi.

Tá so tann av Landsverk ætlaði tunnil við Líðarenda mátti vera sera brøtt, so kann hetta einans samanberast við rusjibanan í Tivoli.

Men LBF hevur so einans sær fyri sær, at gamli Skarvanesvegurin skuldi breiðkast.

Eg havi tí skrivað viðløgdu viðmerkingar til ætlanina hjá Tunnilsfelagnum og LBF, sum eg vil skýra sum verandi undir alt lámark hjá sjálvt einum skúlapraktikanti, at leggja fram.

SKOM, og aftur SKOM.

Latið meg at enda gera vart við, at eg frámali einum tunnli úr Djúpadali, sum einans kann skýrast sum ørðskapur, tá har eru aðrar og betri loysnir, og eg vil viðmala eina byrging frá Skarvanesi til Skúvoyar.

Við tí í huga, vil eg leggja fram fylgjandi:

Nýggir landsvegir, og íbindingar til bygdir, á Sandoynni.

Onki er at taka seg aftur í, at tað var nakað - elligamalt - MAKKVERK hjá LANDSVERK, sum Tunnilsfelagið legði fram á hoyringsfundunum.

Landsverk skal halda fingrarnar LANGT vekk, heldur suðuroyartingmaður, sum er limur í politisku fylgibólkinum, og tá er tað óunniligt, at eingin annar átalaði hansara bomastisku krøvum.

Men so verður skilið - ella ÓSKILIÐ - hareftir.

Líka so óskiljandi er tað, at Landsverk - gjøgnum árini mong - onki betri hevur at bjóða, enn at bora styttri og longri tunnlar frá vegnum á Líðarenda, sum liggur í 70 m. hædd, fyri at sleppa

niðaná, á Brekkuni Stóru, sum liggur í 122 m. hædd, tá samankomingin til Húsavíkar og Dal liggur í 80 m. hædd.

Samankomingin til Skarvanes liggur í 103 m. hædd og gongur bratt oman ímóti Stóravatn, har vegurin liggur í 32 m. hædd.

Men fram við vegnum til Skarvanes er eitt endurnýtslu- og tyrvingarpláss í 70 m. hædd.

Tí er tað eyðsæð, at heldur enn at snara knapt niðaná við Líðarenda, so er at leggja nýggja landsvegin í somu hædd millum vegirnar við Líðarenda og tyrvingarplássið, og at vegurin heldur sær eitt sindur niðanfrá við Líðargjógv, og tað er væl gjørligt.

Síðani kan nýggi landsvegurin ganga í einum bleytum boga niðan móti samankomingini til Húsavíkar og Dal, sum tá einans liggur 10 m. hægri. Sjá mynd.

Sparingin í brennievni og CO2, hevði goldið fyri umleggingina eftir fáum árum.

Men tað ger onki, man onkur helst hava hildið, tí tað eru "bara" Sandoyarfólk og náttúran, sum higartil - í hálva øld - hava goldið tað "gildið".

Vinaliga

Jóannes í Dali


Finn matrikul, adressu, stað
0.4km
0.4km
212.316 857.241 Meter
©Umhvørvisstovan
POWERED BY esri

Til Løgmannsskrivstovuna.

Góða Doris.

Eg ætli mær í hoyringsskrivum:

1. at "mótmæla" dumpingin av tunnilsgróti í Sandvík.

2. at senda uppskot sambart tí sum liggur á Facebook vanganum hjá mær.

Eg havi tíverri enn ikki fingið innlit í tey skjøl sum Landsverk hevur viðvíkjandi dátum sum eru viðkomandi í einari neyvari framlegging.

3. at seta upp ein handlingsplan, sum vísur ræðfylgjuna tey ymsu umleggingartiltøkini, byggitiltøk og atliggjandi tiltøk skulu setast í verk, tá farið verður undir broytingina frá skipa- og tyrlusambandi til vegasamband, via einum fergusambandi Hvalba – Sandoy í byggitíðini.

4. sum vit tosaðu um – at tilmala, at Landsstýrið setur eina kommissión, sum fær til uppgávu at savna og útgreina hvat suðurøkið tørvar mest, og í hvørjari prioritet, m.a. í tráð við tí sum Sámal Matras Kristiansen nevnir í grein síni:

https://jn.fo/sandoyggin-ma-stadfesta-og-verja-sini-aktiv

Tað má viðurkennast, at eitt hol ikki “bjargar” Suðuroynni, tí strekkið er alt ov langt til at arbeiðast kann í Havn, meðan Sandoyggin hevur júst tey potentialir sum skulu til, fyri at alt suðurøkið kann mennast.

Harundir hoyrir eisini tann flogvalla- og (brennievnis-) fríhavnsverkætlan sum eg havi lagt á FB-vangan hjá mær, og sum bygdaráðið í Skálavík er sera jaligur um, og sum er viðurkendur av Luftfartsstyrelsen.

Ein 3.000 m. langur altjóða flogvøllur á Sandoynni hevur eyðsýnd potentiali at kunna gerast eitt altjóða “flog-hub”, har flogfør lenda og bunkra, so transit-farmurin kann økjast.

Hetta kann EINANS realiserast um ein byrging kemur, so eitt havnalag kann gerast, og ein oljuterminalur kann koma.

Tá eitt samfelag samtykkir at nýta t.d. 5 milliardir uppá at broyta eina farleið, so er tað avgerandi neyðugt at byggitíðin verður so stutt sum gjørlig, og tað kann gerast við at hava Skúvoy og Stóru Dímun sum "løgusteinar", so borast kann frá fýra portalum, so ágóðin byrjar at síggjast sum skjótast – í byggitíðini – og ikki fyrst tá tann samlaða verkætlanin er liðug.

Tað er júst tað sum hendir, um tað einans verður fokuserað uppá eitt meira enn dupult so langt hol frá A til B, og sum tekur 10-12 ár at fremja.

Tað er átrokandi neyðugt, at partar av verkætlanini kemur til nyttu í høvuðsverkætlanatíðini, so sum t.d. fergusambandið Hvalba – Sandoy, ein byrging við verandi tunnilsgróti á goymslu á landi til víðkan av aliøki, og seinni til fergulegu á Skarvanesi, so siglingstíðin Hvalba - Sandoy kann styttast, og ferðslan leiðast burtur úr Sands bygd, og at byrjað verður at planera fyri flogvøll – í tann mun byrgingin og havnalag tørvar dekkgrót.

Eisini eigur at vera umhugsað tað sum Zakarias Wang viðmælir, at bjóða verður til hugskotskapping:

https://www.vp.fo/news/suduroyarvegurin-1

Orsøkin til hesi hoyringsskriv er, at nú hevur Tunnilsfelagið “arbeitt” við ætlanini um eitt LANGT hol í uml. 2 ár, har tað so eftirfylgjandi visir seg, at teir als ikki hava hugsað um annað enn hetta langa holið, og hóast at ein arbeiðsbólkur bleiv settur at umhugsa hvar tunnilsgrótið kundi gera nyttu, so kom man til tað úrslit sum tann starblinda moldvørpan hevði valt sær, nemliga at leggja tað rundanum sít moldvørpuhol.

Tunnilsfelagið hevur í verki víst, at teir arbeiða og hugsa sum ein moldvørp, og ikki megnar uppgávuna, og fyri tað um Løgtingið ikki hevur ov høgar tankar um Landsverk, so hava vit nú fingið sjón fyri søgn, at aðrar kreftir kunnu vera munin verri og gerast enn størri snávingarsteinar fyri framburði og mennan.

Suðringar hava nú – til onga nyttu – bíðað eftir føstum sambandið í tvey ár, tí A-B verkætlanin bleiv vrakað við einum braki, tí man – í sínari magtgirnd – onki legði í at hoyra, hvat tey sum skuldi leggja lendi til høvdu at siga, og tí má byrjast av nýggjum og leggjast á rættan bógv.

Vónandi fái eg hetta avgreitt innan næstu viku.

Vinaliga

Jóannes í Dali



Til Løgmannsskrivstovuna.

Góða Doris.

Eg ætli mær í

hoyringsskrivum:

1. at "mótmæla" dumpingin av tunnilsgróti í Sandvík.

2. at senda uppskot sambart tí sum liggur á Facebook vanganum hjá mær.

Eg havi tíverri enn ikki fingið innlit í tey skjøl sum Landsverk hevur viðvíkjandi dátum sum eru viðkomandi í einari neyvari framlegging.

3. at seta upp ein handlingsplan, sum vísur ræðfylgjuna tey ymsu umleggingartiltøkini, byggitiltøk og atliggjandi tiltøk skulu setast í verk, tá farið verður undir broytingina frá skipa- og tyrlusambandi til vegasamband, via einum fergusambandi Hvalba – Sandoy í byggitíðini.

4. sum vit tosaðu um – at tilmala, at Landsstýrið setur eina kommissión, sum fær til uppgávu at savna og útgreina hvat suðurøkið tørvar mest, og í hvørjari prioritet, m.a. í tráð við tí sum Sámal Matras Kristiansen nevnir í grein síni:

https://jn.fo/sandoyggin-ma-stadfesta-og-verja-sini-aktiv

Tað má viðurkennast, at eitt hol ikki “bjargar” Suðuroynni, tí strekkið er alt ov langt til at arbeiðast kann í Havn, meðan Sandoyggin hevur júst tey potentialir sum skulu til, fyri at alt suðurøkið kann mennast.

Harundir hoyrir eisini tann flogvalla- og (brennievnis-) fríhavnsverkætlan sum eg havi lagt á FB-vangan hjá mær, og sum bygdaráðið í Skálavík er sera jaligur um, og sum er viðurkendur av Luftfartsstyrelsen.

Ein 3.000 m. langur altjóða flogvøllur á Sandoynni hevur eyðsýnd potentiali at kunna gerast eitt altjóða “flog-hub”, har flogfør lenda og bunkra, so transit-farmurin kann økjast.

Hetta kann EINANS realiserast um ein byrging kemur, so eitt havnalag kann gerast, og ein oljuterminalur kann koma.

Tá eitt samfelag samtykkir at nýta t.d. 5 milliardir uppá at broyta eina farleið, so er tað avgerandi neyðugt at byggitíðin verður so stutt sum gjørlig, og tað kann gerast við at hava Skúvoy og Stóru Dímun sum "løgusteinar", so borast kann frá fýra portalum, so ágóðin byrjar at síggjast sum skjótast – í byggitíðini – og ikki fyrst tá tann samlaða verkætlanin er liðug.

Tað er júst tað sum hendir, um tað einans verður fokuserað uppá eitt meira enn dupult so langt hol frá A til B, og sum tekur 10-12 ár at fremja.

Tað er átrokandi neyðugt, at partar av verkætlanini kemur til nyttu í høvuðsverkætlanatíðini, so sum t.d. fergusambandið Hvalba – Sandoy, ein byrging við verandi tunnilsgróti á goymslu á landi til víðkan av aliøki, og seinni til fergulegu á Skarvanesi, so siglingstíðin Hvalba - Sandoy kann styttast, og ferðslan leiðast burtur úr Sands bygd, og at byrjað verður at planera fyri flogvøll – í tann mun byrgingin og havnalag tørvar dekkgrót.

Eisini eigur at vera umhugsað tað sum Zakarias Wang viðmælir, at bjóða verður til hugskotskapping:

https://www.vp.fo/news/suduroyarvegurin-1

Orsøkin til hesi hoyringsskriv er, at nú hevur Tunnilsfelagið “arbeitt” við ætlanini um eitt LANGT hol í uml. 2 ár, har tað so eftirfylgjandi visir seg, at teir als ikki hava hugsað um annað enn hetta langa holið, og hóast at ein arbeiðsbólkur bleiv settur at umhugsa hvar tunnilsgrótið kundi gera nyttu, so kom man til tað úrslit sum tann starblinda moldvørpan hevði valt sær, nemliga at leggja tað rundanum sít moldvørpuhol.

Tunnilsfelagið hevur í verki víst, at teir arbeiða og hugsa sum ein moldvørp, og ikki megnar uppgávuna, og fyri tað um Løgtingið ikki hevur ov høgar tankar um Landsverk, so hava vit nú fingið sjón fyri søgn, at aðrar kreftir kunnu vera munin verri og gerast enn størri snávingarsteinar fyri framburði og mennan.

Suðringar hava nú – til onga nyttu – bíðað eftir føstum sambandið í tvey ár, tí A-B verkætlanin bleiv vrakað við einum braki, tí man – í sínari magtgirnd – onki legði í at hoyra, hvat tey sum skuldi leggja lendi til høvdu at siga, og tí má byrjast av nýggjum og leggjast á rættan bógv.

Vónandi fái eg hetta avgreitt innan næstu viku.

Vinaliga

Jóannes í Dali



Til Løgmansskrivstovuna.

Góða Doris.

Vegna tíðarneyð í mun til hoyringsfreistina tann 12.12.2024, so vil eg biða um at fáa tær teldupostarnar eg havi sent tykkum, at innganga sum biløg í hoyringsskrivum mínum.

Eg vil enn einaferð gera vart við at Landsverk og Landsbyggifelagið sigur ósatt hvat viðvíkur tunnilsgrót.

Tað gjørdi ein bygdaráðslimur í Húsavík eisini vart við í ÚV í dag.

Aftaná at tunnilsgrótið er sprongt fyllir tað uml. 1,5 -1,7 ferðir so nógv, og teir uppgeva - enntá eitt minni tal - enn áðrenn grótið er sprongt.

Hetta gera teir deils fyri at tað ikki skal virka so ógvursligt, og deils tí at Landsverk fyrr hevur sagt, at ein byrging krevur 6-8 ferðir so nógv grót sum ein Suðuroyartunnil kan framleiða, men nú hava teir viðgingið at har einans skal nýtast uml. 6 mill. m3, so tilsamans við tí tunnilsgróti sum liggur á landi, er nokk til eina byrging.

Eg viðleggi talvuna sum Landsverk hevur gjørt.

Har framgongur tað at Suðuroyartunnilin og Sandvíkartunnilin tilsamans framleiða 3.300 mill.

+ 0.350 mill. m3 = 3.650 mill. m3 av tilfari.

Vinaliga

Jóannes í Dali

6. MØGULEIKAR VIÐ TUNNILSGRÓTINUM ÚR SUÐUROYARTUNLINUM

TALVA 19: MONGD AV LEYSUM TUNNILSGRÓTI, SUM VERÐUR ÚTVEGAÐ VIÐ YMISKUM VEGLINJUM OG ARBEIÐSHÁTTUM

	Møguleiki 1 Skarvanes ↔ Sandvík	Møguleiki 2 Sandur ↔ Sandvík	Møguleiki 3 Sandur ↔ Skúgvoy ↔ Sandvík	Nýggjur Sandvíkartunnil
Drill and blast (D&B)	3.300.000 m^3	3.600.000 m^3	3.800.000 m^3	350.000 m^3